

# Gamli Bókhandil síðani 1859

**H. N. Jacobsens Bókhandil hevur søgu aftur til 1859 og helt tá til í Gongini í Havn. Men í mong ár hevur bókhandilin verið partur av søguni og ein býarmynd og Vagið hevði ikki verið tað sama uttan bókhandilin**

Í 1859 byrjaði H. N. Jacobsens Bókhandil. Men talan var ikki um bókhandil, men bókbindarí, og tá var hetta eisini í Gongini í Havn. Seinni gjørdist hetta H. N. Jacobsens bókhandil á Vaglinum í Havn og skuldi seinni blíva ein býarmynd í Havn.

Í 1865 fekk H. N, Jacobsen loyvi at selja bøkur. Hetta skuldi til í teimum døgum. Ein kann sammeta tað við apotekini í dag. Ein og hvør fekk ikki slíkt loyvi, men forløgini – sertakiliga Gyldendal, góvu serlig loyvi.

## Søga

Í mong ár var bókbindarí og prentsmiðja í húsinum á Vaglinum. Prentsmiðjan gavst fyri helt fáum árum síðani.

Men nýggjar tíðir krevja sítt. Í dag er tað, sum á manna munni verður nevnt Gamli Bókhandil, ein vanligur bókhandil, og partur av húsinum verður leigaður út til kunningarstovu.

## Jól

Nú jólini eru í hondum, so vitja fólk ofta bókhandlarnar. Og hetta merkist eisini í H.N. Jacobsens Bókhandli á Vaglinum í Havn. Bøkur koma oftast út til jóla og liggja ofta sum gávur undir jólatrøunum.

Umframt bøkur, so hevur Gamli Bókhandil í Havn alt, sum bókhandlar flestir hava.

Gamli Bókhandil í Havn er framvegis partur av býarmyndini, uttan mun til árstíðina, men hugnaligt er um jóltíðir at síggja ljósini í stóru trøunum á Vaglinum, ið geva helt serligan hugna og beina hugan aftur á farna tíð, tí hesi trø eru helst millum tey elstu í landinum.

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin*











